Filmurin

# Apocalypto - undirgangurin
## - Ein áhugaverdur filmur um Majaríkið

### Ummæli



**Kim Simonsen**
kimsimonsen@hotmail.com

*"A great civilization is not conquered from without until it has destroyed itself from within."*
*W. Durant frá filminum.*



Mel Gibson hevur seinastu árini gjørt nógv um seg sum leikstjóri. Nógv kjak var um filmin um Jesu líðing, ið varð hildin at vera bíbliufundamentalistiskur. Við filminum Apocalypto hevur gamli Mad Max leikarin sameint harðligar figurar frá Mad Max filminum, harðskapin og hetjusøgurnar í Braveheart við blóðugta The Passion of the Christ. Apocalypto er óvanliga brutalur. Einum so ráu filmi, við einari so harðligari og ræðuligari søgu skal man leita leingi eftir.

Søgan er áhugaverd, og hon er um stóra Mayaríkið. Hetta ríkið, ið breiddi seg frá Meksiko, Guatemala, Belize, Honduras og El Salvador.

Hetta er tíðin, tá Mayaríkið er um at týna seg sjálvt í 1500 talinum, júst áðrenn spaniumenn koma har um leiðir og týndu fólkini.

Vit koma at síggja Mayaríkið gjøgnum eyguni á unga veiðumanninum Paw, ið upplivir at Mayafólkini koma til hansara fólk, Holcane fólkini, og drepa tey flestu, restina taka hesir við sær, tí hesi skulu ofrast til gudarnar ella seljast sum slavir.

Ungu mennirnir skulu blíðka sólgudin. Teir skulu lata lív. Saman við fleiri hundað øðrum kemur Paw til stóra tempulbýin, har alt flýtur í blóði. Høvdini rulla og høvuðleys lík flóta í gøtunum. Harðskapurin og yvirgangurin og valdsgerðirnar eru ræðuligar í filminum. Hann er yvirhøvur ikki fyri fólk við sartum nervum.

Beint áðrenn bøðilin skuldi stinga Paw og skræða bankandi hjarta úr bróstinum, kom ein sólarmyrking, so hálsvøddarnir hjá Paw vóru spardir og ikki sprongdir sum hjá øllum hinum. Hann og nakrir aðrir fangar fáa loyvi at rýma, um teir megna at renna undan pílunum og spjótunum hjá ráu mayahermonnunum. Her endar filmurin eina løtu sum ein sena úr filmum sum Gladiator ella Troy.

Allir doyggja uttan Paw, hann er særdur, men endar við at drepa sonin hjá leiðarinum, so at hesin setur eftir honum at jagstra hann gjøgnum frumskógin. Heima hevur unnusta hansara, ið er við barn, fjalt seg í einum helli. Har liggur hon saman við soninum og er um at drukna og doyggja av svongd.

Hetta er ein spennandi filmur. Apocalypto er ikki sum so um Mayaríkið, men hevur hesa søguna sum bakstøði. Hon er um ein ungan veiðumann, ið er sera kvikur, sterkur og ikki ivast eina løtu um hann skal drepa ella ikki.

Undir longu senuni, har mayahermenninir renna eftir honum, kom eg at hugsa um filmin First Blood, at eisini Sgt. John Rambo, var ein friðarligur maður, men hann varð píndur og eymíktur, so at hann at enda vísir sína sonnu styrki. Við eitt er tað ikki Paw, ið er hin jagstraði, men hinir, ið hann avlívar og pínur ein eftir ein, men mark er fyri hvat ein maur megnar tó.

**Stórfilmur eftir Gibson**
Hesin filmurin er fulkominliga hugtakandi og spennandi allan vegin. Frá fyrstu senuni, ið er um ein tapir, ið veiðumennirnir drepa. Longu her er stemningurin skaptur. Blóðið flytur, fólk verða týnd og við eitt koma spaniumenn. Um mayafólkini ikki doyðu av sjúkum og teirra egna harðskapi, so skuldu spaniumenn syrgja fyri at restin doyi av sjúkum og fyri teirra svørð.

Tað eru nógv sum halda, at Gibson vil brúka hesa søguna um eitt stórríkið, ið drap seg sjálvt, sum eina líkning um USA í dag, men hetta er ikki so týðuligt fyri meg, sum tað er fyri onnur. 1000 ára ríkið, Majaríkið skuldi fella, líkasum nogv droyma um at USA skal fella.

**Gibson er ein originalur**
Tað skal eingin ivi vera um, at Mel Gibson er ein originalur. Ein eksentriskur persónur, ið ger tær svakastu søgurnar í dag innan undirhaldandi filmin.

Hann hevur av sonnum skift spor frá Mad max og Lethal Weapon. Við eitt fór hann at gera stórfilmar sum hin nógv elskaða Braveheart, ið gav honum fimm Oscars virðislønir. Seinni kom so hin sera kontroversielli filmurin The Passion of the Christ. Við Apocalypto hevur hann gjørt ein av sínum bestu filmum, ið veruliga kom at skriva hann inní filmsøguna sum ein stórur leikstjóri innan undirhaldsfilmin.

★★★★★☆

### Fakta um Apocalypto

**Dalia Hernandez**
**Gerardo Taracena**
**Rudy Youngblood**
**Mayra Serbulo**
**Raoul Trujillo**

Leikstjóri Mel Goibson. Frumframsýndur í Havnar Bio fríggjadagin 19. januar klokkan 20.30 og 23.30. 2 tímar og 19 minuttir. Aldursmark 15 ár.

Sosialurin